Starvslýsing

Heimatænastan: Vágar Norðstreymoy

## Sjúkrarøktarfrøðingur í Heimatænastuni Vestmanna/Kvívík

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða í skiftandi vaktum í starvsbrøki 0,6 at byrja 1. Januar 2009.

Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar innan skipanina.

**Førleiki**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga innan primera økið
- Góð samstarvsevni og dugir væl at samskifta
- Ynskiligt er at umsøkjarin hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Vit bjóða**
- Fakliga og persónliga menning
- Gott tvørfakligt samstarv
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt arbeiði
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi

**Setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar. Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni Heimatænastan við útgangsstøði frá Vestmanna.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 333249/282249.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvið verður at senda til :

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Hornaveg 12
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 5. Desember 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til nýggja bústaðin á Leitisvegi á Glyvrum

Til nýggjan bústað til 7 vaksin fólk við menningartarni verður søkt eftir 4 pedagogum, at byrja 1. jan. 2009 og 1 pedagogi at byrja 15. des. 2008. Nærri avtala kann gerast um setan.

Talan er um at byggja upp nýtt virksemi, har gerandisdagurin hjá 7 fólkum skal skipast saman við teimum, sum búgva har, bæði hvat viðvíkur bústaðnum, arbeiði og frítíð. Eisini skula gerast virkisætlanir fyri hin einstaka.

Vit sóknast eftir pedagogum sum duga og vilja átaka sær uppgávur, ið eru samsvarandi tørvi og ynskjum hjá teimum, ið búgva á Leitisvegi.

Hetta hevur við sær at pedagogarnir eru áhugaðir í og kunna luttaka aktivt í nógvum nýggjum avbjóðingum. Tú skal duga væl at samstarva samstundis sum tú eisini kanst átaka tær sjálvsstøðuga ábyrgd

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og talan er um bæði dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

**Setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogar, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starv, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir størvini, verða størvini sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til samskiparin á tlf. 516544

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Økisdeildin
Bókbindaragøta 8
100 Tórshavn
Stílað: Ingrið H. Dalsgaard

**Umsóknarfreist: 5. desember 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



# Leys størv í Tórshavnar kommunu

### Pedagogur til Býlingshúsið á Norðasta Horni

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30-35 tímar um vikuna at byrja 1. januar 2009 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum á Norðasta Horni, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 8. desember 2008.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, telefon 21 09 06.

Tórshavnar kommuna